tíðindablaðið
sosialurin
Nr. 186 Fríggjadagur 29. september 1995 69. árgangur Krónur 7,00

## Skúlaflokkur hevur sín egna politist:



## Jákup er góður við 4. a á Eystur-skúlanum

*Á triðja árið hevur 4. a í Eysturskúlanum havt sín egna politist, sum tey altíð kunnu venda sær til*

síða 4

## Fer eitt risatangaskip á land við Føroyar:

# Ongin tilbúgvingar-ætlan ella útgerð

*– Í einí komandi oljuvinnu er alneyugt at hava eina tilbúgvinarætlan og útgerð, skuldi ein størri oljudálkingarvanlukka hent í Føroyum, eitt nú at eitt oljuskip fór á land, sigur Jóan Karl Høgnesen, leiðari á Vaktar- og Bjargingartæanstuni. Hann hevur júst verið á skeið í Hetlandi um hetta evnið*

síða 8



## Fíggjarmálaráðharrin um Fólkaflokksloysnina



# Skapar fleiri trupulleikar enn hon loysir

síða 3



# Notre Dame gerst nú náttarcafé

baksíðan

THE WORLD COUNTS ON TRULY®

100 TEL

AUTO POWER OFF



MODEL
MD168

kr. 195,-

SPARD KRÓNA ER VUNNIN KRÓNA

pappírslonin
Sverrisgøta 9 • FR-110 Tórshavn
Tlf 10603 • Fax 10806 • Box 195

GRUNDSTYKKIR
til sølu

Reynsgøta 55, Argir
Til viddar: 627 m²

Lítla Gil 64, Hoyvík
Til viddar: 505 m²

Gerðisvegur 7, Hvítanes
Til viddar: 636 m²

Varðalág 6, Tórshavn
Til viddar 466 m²

Nærri fæst at vita við at venda sær til innheintingardeildina í Tórshavn, tlf. 14800.

FØROYA SPARIKASSI

Blindastovnur Føroya
hevur opið mánadag–fríggjadag kl. 9–16.
Telefonir: 18222 og 19288.



*Stratos fekk maskinskaða sunnantyri Føroyar herfyri, og varð slepað í Nólsoyarfjørð, har brekið varð umvælt*

*Jóan Karl Høgnesen, leiðari á vaktartænastuni:*

# Fer nú undir at tryggja okkum móti dálkingar vanlukkum

*– Í Føroyum hava vit onga rættuliga tilbúgvingarætlan, skuldi tann stóra oljuvanlukkan farið fram, eitt nú sum við Braer í Hetlandi. Ein slík ætlan kostar einki. Men útgerðin kostar pening, sigur nýggi leiðarin á vaktartænastuni*

Leiðarin á Vaktar og Bjargingartænastuni, Jóan Karl Høgnesen, hevur júst verið á skeiði í Hetlandi, har tosað hevur verið um hvussu sleppst undan størri vanlukkum og hvussu ein skal bera seg at, tá vanlukkan er hend. Í Hetlandi hendi herviliga Braer vanlukkan herfyri, og har hava teir royndirnar hvussu ein skal bera seg at og serliga hvussu ein ikki skal bera seg at.

– Í Føroyum hava vit onga tilbúgvingarætlan, skuldi ein størri oljudálking farið fram. Men í eini komandi oljuvinnu er neyðugt at fáa hetta uppá pláss. Sjálv tilbúgvingarætlanin kostar ikki pening. Her snýr tað seg um at fáa tær ymisku stovnarnar at arbeiða saman. Men útgerðin til at basa einum størri oljudálking kostar pening, sigur Jóan Karl Høgnesen.

– Stór oljuskip sigla í føroyskum sjógvi og hendir nakað, so kann hetta fáa álvarsligar avleiðingar fyri náttúruna. Men serliga ein komandi oljuvinna skundar undir, at vit fáa eina tilbúgvingarskipan, sigur Jóan Karl Høgnesen.

Tað var ein altjóða felagsskapur, KIMO, (kommunernes internationale miljø organisation), sum skipaði fyri fundinum og kommunufelagið í Føroyum heitti á Jóan Kral Høgnesen um at luttaka. Hann var á skeiðnum saman við skrivaranum í Kommunufelagnum, Jens Marius Dalsgaard. Hesin felagsskapur hevur ongan myndugleika, men kann koma við tilmælum. Endamálið við fundinum í Hetlandi var at gera Norðsjógvin reinari.

– Tað vísir seg, at longur norður tú kemur, tess vandamiklari er oljudálking. Hetta kemst av kaldari sjógvi, sigur hann.

– Heimaftur havi eg við mær eina drúgva frágreiðing um Braer vanlukkuna og hvat myndugleikarnir lærdu av hesi. Hendan frágreiðing er 500 síður drúgv og er skrivað av Lord Donaldson. Hon snýr seg serliga nógv um hvussu skipini kunnu gerast tryggari. Eitt nú við dupultum skrokki, tveimum motorur, tveimum skrúvum o.s.v. Braer fór júst á land, tí hann fekk motorskaða, sigur Jóan Karl Høgnesen.



*Oljuskipini sigla í føroyskum sjógvi*

– Í Hálandi er eitt felag, ið sýnar skip á sama hátt sum eitt nú Loyd's. Hetta felag kann geva skipum, sum lúka treytirnar eitt sertifikat, ið verður kallað Green Award. Hatta sertifikat verður givið, tá trygdarviðurskiftini umborð eru í lagi og kann eitt nú geva skipinum avsláttur til lóðs og aðrar tænastur, tá skipið kemur í Havn. Eitt nú í risaoljuhavnini í Rotterdam fáa hesi skip avsláttur, sigur Jóan Karl Høgnesen.

**jústinus**

Sosialurin – fimm ferðir um vikuna!